# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit í ES mugu ansa eftir, at orðaskiftið um Lissabon-sáttmálan ikki endar sum ein sápuopera*
*Nicolas Sarkozy, forseti*

# Møðurnar úr Screbrenica sleppa ikki at kæra ST og Niðurlond



*Umleið 8.000 muslimskir menn og dreingir vórðu skotnir í hópdrápinum í Screbrenica tann 11. juli í 1995*
*Mynd: Polfoto*

**Ber tað til at geva niðurlendsku stjórnini og ST ábyrgdina av hópdrápinum í Screbrenica, tí niðurlendsku ST-hermenninir ikki royndu at forða fyri, at 8.000 menn og dreingir vórðu tiknir av døgum?**

Tann spurningin ætlaðu tey avvarandi hjá teimum, sum vórðu fyribeind í Screbrenica, at leggja fyri niðurlendska dómsvaldið. Men tað ber ikki til, tí sambært einum niðurlendskum dómstóli kann málið ikki leggjast fyri rættin, tí ST kann ikki kærast í einum tílíkum máli.

Sakførararnir hjá teimum avvarandi vilja ikki góðtaka niðurstøðuna hjá dómstólinum, og teir hava boðað frá, at teir fara at leggja úrskurðin fyri evropeiska mannarættindaadómstólin.

Hópdrápið í Screbrenica var tann 11. juli í 1995, og tað hendi, hóast býurin var mitt í einum øki, sum ST hevði lýst sum trygdarøki. Men teir niðurlendsku ST-hermenninir, sum høvdu støð í økinum, forðaðu ikki teimum serbisku hermonnunum at savna 8.000 menn og dreingir í býnum og at beina fyri teimum.

Umleið 6.000 avvarandi hava gjørt av at leggja sak ímóti niðurlendsku stjórnini og ST. Kring heimin eru tey best kend undir navninum Møðurnar úr Screbrenica.

### Høvdu ongan møguleika

-Møðurnar úr Srebrenica eiga at fáa viðhald í, at niðurlendska stjórnin og ST hava ábyrgdina av fólkamorðinum í Screbrenica. ST-hermenninir høvdu ógvuliga greiðar heimildir, men teir gjørdu einki fyri at forða serbisku hermonnunum at útinna illgerðina. Tí er tað okkara hugsan, at báðir partar mugu ábyrgjast, sigur Semir Guzin, sum er sakførari hjá Møðrunum úr Screbrenica, við BBC.

Jan Willem Honig, sum er professari í krígsførslu á verjuháskúlanum í Stockholm, - hevur skrivað eina bók um sorgarleikin í Screbrenica, og hann hevur alla tíðina sagt, at tað ber neyvan til at draga nakran fyri rættin í sambandi við tilburðin. Eftir hansara tykki høvdu teir niðurlendsku ST-hermenninir lítlar møguleikar at forða tí, sum hendi.

- Tað var ein vónleys uppgáva hjá teimum. Teir vóru ikki nóg væl útgjørdir, og serbiski herurin forðaði fyri, at teir fingu betri útgerð. Nógvir av teimum niðurlendsku hermonnunum vóru komnir til Bosnia at hjálpa til við flutningi og høvdu tí avmarkaða venjing til bardaga. Harafturat vóru teir serbisku hermenninir munandi fleiri í tali og harafturat nógv betur útgjørdir, sigur Jan Willem Honig við BBC.

# Tiltøk kunnu elva til borgarakríggj

**Samtykkir ST-trygdarráðið at seta tiltøk í verk ímóti Zimbabwe, fer tað at elva til borgarakríggj har**

ST verður eitt nýtt Somalia, um ST samtykkir at seta fleiri tilktøk í verk ímóti landinum fyri at revsa stýrið hjá Robert Mugabe, forseta.

Tað sigur ST-sendinevndin hjá Zimbabwe um tiltøkini, sum USA og Bretland hava mælt ST-trygdarráðnum til at seta í verk fyri at noyða stýrið hjá Robert Mugabe, forseta býta valdið við andstøðuna.

Eftir uppskotinum hjá USA og Bretlandi skal ST samtykkja at seta fíggjarlig tiltøk ímóti fleiri týðandi einstaklingum í Zimbabwe, og harafturat skal allur vápnahandil við landið steðgast.

Liberiski forsetin, Ellen Johnson-Sirleaf, hevur sagt, at hon tekur undir við uppskotinum um tiltøk ímóti stýrinum í Zimbabwe.

## STUTT SAGT

### Nóg mikið tosað

Franski forsetin, Nicolas Sarkozy, ávaraði í gjár ES-tingið ímóti at brúka óneyðuga tíð til at viðgera Lissabon-sáttmálan. Franski forsetin segði, at væl hava írar vrakað sáttmálan, men at tað eigur ikki at elva til eitt orðaskifti, ið mest av øllum er átøkt einari sokallaðari sápuoperu. Tann 1. juli tók Frakland við formanssætinum í ES, og franska stjórnin hevur sett sær fyri at loysa ósemjuna um Lissabon-sáttmálan, áðrenn landið letur formanssessin frá sær á nýggjárinum. Sarkozy, forseti, hevur tó gjørt greitt, at einki land verður sett eftir ella uttanfyri, men at øll tey 27 limalondini skulu fylgjast sum ein eind.



*Nicolas Sarkozy, forseti*
*Mynd: AFP*

### Arabar keypa í New York

Nú eiga arabar eitt av teimum best kendu háhúsunum í New York. Eitt íløgufelag, sum tað almenna í Abu Dhabi eigur, hevur keypt Chrysler-bygningin. Sambært amerikonsku fjølmiðlunum hava arabar keypt 75 prosent av bygninginum, og fyri tann partin hava teir goldið umleið fimm milliardir krónur. Chrysler-bygningurin er ikki tað einasta háhúsið í New York, sum er arabisk ogn. Frammanundan eiga arabar tann kenda General Motors-bygningin og Citigroup-bankan.



*Arabar eiga fleiri háhús í New York*
*Mynd: AP*